


# Norðlandslúðurin á føroyskum

Herfyri varð nýggj, føroysk útgáva av tí kendu bókini eftir Petter Dass, *Norðlandslúðurin*, løgd fram. Tað er Axel Tórgarð, sum hevur týtt hana til føroyskt, og er hon sera løtt at lesa, og er alt í henni so heimligt fyri okkum føroyingar. Forlagið Stiðin gevur út.

*Kenda bókin »Norðurlandslúðurin« er komin út í nýggjari útgávu*




# Latín fyri byrjarar

Bókin *Fabula* er byrjanarbók fyri tey, sum hava hug at læra seg latín. Bókin er týdd úr donskum, eftir høvundan Tove Niclasen. *Fabula* hevur staðið sína roynd bæði í tí føroyska og danska skúlaverkinum, og verður nú at fáa í bókabúðunum. Forlagið Stiðin gevur út

*Við nýggju bókini »Fabula« hava øll nú høvið at læra seg latín*

## Bøkur

# Zakaris Wang tosar við stjórnmálamenn

**Samskifti hjá Zakaris Wang í 1964 við eina røð av stjórnmálamonnum er nú komið út í bók**

ÚTGÁVA

Samrøðurnar í bókini *Samskifti við stjórnmálamenn 1964* gjørdi Zakaris Wang, í sambandi við at hann skrivaði serritgerð í stjórnmálafrøði á Århus Universiteti um viðurskiftini millum løgting og landsstýri undir heimastýrinum.

### Djúpar samrøður

Teir, sum samrøðurnar eru við, hava livað tá fólkaatkvøðan var í 1946, og hava teir nógv at siga um hesa hending. Harumframt er nógv um, hvussu samráðingar vóru millum flokkarnar um at skipa landsstýri, og tað var minst líka so spennandi, sum tað kann vera í dag, sigur Zakaris Wang.

Fyri nøkrum árum síðani prentaði Sosialurin tvær av hesum samrøðu, ta við P. M. Dam og ta við Jóhan Petur Davidsen. Henda seinna vakti mikla øsing, men nú ber til hjá øllum at gera sínar metingar um hvørt nøkur orsøk var til hana.

Summar av stjórnmálamonnunum fekst bert fatur í við brævasamskifti, men tað eydnaðist at fáa djúptøknar samrøður við fyrrverandi løgmenninar Kristian Djurhuus og Petur Mohr Dam, sum høvdu nógv áhugavert at siga. Harumframt var bæði samrøða og brævaskifti við Rikard Long, fyrrverandi løgtings- og landsstýrismann, samrøða við Jóhan Petur Davidsen, løgtingsmann og fyrrverandi landsstýrismann, eins og við Erlend Patursson, løgtings- og landsstýrismann. Samrøða var við Trygva Samuelsen og Kjartan Mohr, løgtingsmenn, við J. H. Danbjørg og Jákup í Jákupsstovu, fyrrverandi løgtingsmenn. Harumframt var samrøða við blaðstjóran á Føroyatíðindum, Jens Dam, og nógv brævasamskifti var við teir, sum høvdu við hini bløðini at gera. Edw. Mitens, fyrrverandi landsstýrismaður, gav nógvar skrivligar upplýsingar. Hann var fyrsti skrivstovustjóri hjá landsstýrinum, og long samrøða er eisini við táverandi skrivstovustjóran Johan Djurhuus.




*Nógvir av stjórnmálamonnunum, sum Zakaris Wang tosar við í bókini, minnast fólkaatkvøðuna í 1946 og hava nógv at greiða frá um umstrídda málið*

### Hent tilfar

Zakarias sigur, at mesta av hesum tilfari hevur ligið í einari mappu, og helt hann at tað var synd um tað forførst, tí tað er møguligt at onkur kann halda tað í ein ávísan mun nýtast sum keldurtilfar til føroysk samfelagsviðurskifti um hetta mundið. Tí hevur hann skrivað bókina og gjørt hana nýtiliga við at hava ein fullfiggjaðan stíl, har tað stendur nær tey fólk, sum nevnd eru í bókini, hava livað.

Tað er forlagi Stiðin, sum gevur út

# Nýggja yrkingar frá Ludvík Breckmann




*Fyri aðru ferð roynir Ludvík Breckmann seg sum yrkjara við nýggja yrkingasavninum »Svartir svanar«*

YRKINGASAVN

Nú um dagarnar kemur út nýtt yrkingasavn hjá Ludvíki Breckmann. Heitið á nýggja savninum er *Svartir Svanar*.

Einar 60 yrkingar eru í savninum, sum við sterkum málrútmum og leikandi orðastevi lýsir bjartar og daprar kenslur, ljós og skuggar í sinninum hjá einum unglinga heima í Føroyum og burturi í londum.

Hesar yrkingarnar eru allar nýggjar og hava ikki verið á prenti fyrr. Men ikki allar eru ókendar, tí yrkjarin hevur lisið nakrar av teimum upp við onkur almenn høvi, eitt nú á mentanartiltøkum, kvøldsetum, á ólavsøku og tílíkt, saman við øðrum yrkjarum, tónleikarum og sjónleikararum.

Hetta er annað yrkingasavnið hjá Lúdvíki Breckmann. Tað fyrra kom út í fjør, og hevur tað heitið *Sálarføði* og fevnir um einar 100 yrkingar

Yrkingasavnið *Svartir svanar* er givið út á egnum forlagi.

# Børnini læra at ríma

**Í nýggja savninum *Omma blomma abbi krabbi* kunnu børnini nú læra bæði nýggjar rímur og tær, sum ommur og abbar minnast frá tá tey vóru børn**

RÍMUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Bókin við stuttliga heitinum *Omma blomma abbi krabbi* er fyrsta savn av sínum slag á føroyskum við rímum, ramsum, skjaldrum og sangum. Í bókini eru bæði nýggjar og gamlar rímur; ramsir sum børn kenna frá barnagarðinum, og skjaldur sum ommur og abbar minnast frá teirra barnaárum.

### Ans fyri málinum

Gransking vísir, at børn, sum duga at ríma, fáa ein serligan ans fyri málinum, ein førleika, sum tey kunnu brúka, tá ið tey skulu læra at lesa. Børnum dámar at tosa, syngja og røra seg saman við vaksnum og øðrum børnum, og við rímum og ramsum fáa tey høvi at nýta kropp, mál og hugflog á ein stuttligan hátt.

Alt tilfarið í bókini er savnað serliga við máli og málmenning í huga. Málsliga menningin er knýtt at, um foreldur ella onnur lesa søgur, siga rímur ella syngja sangir ***saman*** við børnunum - og gera tað javnan.

Litríku tekningarnar í bókini eru nýggjar. Árni Winther hevur teknað. Dentur er lagdur á, at myndirnar skulu lýsa heimliga umhvørvið hjá børnunum. Hannis Egholm hevur gjørt layout, umbrotið og greitt til prentingar.

Bókin er ætlað foreldrum, ommum og abbum, barnagørðum, vøggustovum, dagrøktum og øðrum, sum eru um børnini.

Sissal Maria Rasmussen hevur savnað tilfarið. Hon hevur seinastu árini arbeitt við børnum og málmenning og kennir tí tørvin á tilfari. Í Ommu blommu abba krabba eru 74 ramsur og sangir, harumframt er ein heimasíða knýtt at bókini, har øll kunnu geva teirra íkast. Útgevarin vónar, at bókin fær folk at minnast aðrar rímur ella aðrar útgávur av ramsunum, og at tey so velja at leggja hetta út á heimasíðuna hjá Ommu blommu abba krabba á www.snar.fo.




*»Omma blomma abbi krabbi« er fyrsta bókin av sínum slag við rímum og ramsum á føroyskum*

Tað er Føroya Skúlabókagrunnur, sum gevur bókina út.



*Í bókini eru 74 ramsur og sangir, sum børnini skjótt kunnu læra seg uttanat*